


*- Av tí at Shell er við í myndini og skipar fyri nógvum av tí praktiska, hava hinir fyrireikararnir størri møguleikar at gera nøkur ting, ið annars ikki høvdu verið gjørlig, sigur Leif Eliasen*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

# Slitin dekk telja niður

**Á Trucker Festivalinum, sum hesaferð verður í Klaksvík, verður eins og undanfarin ár kappast í ymiskum bólkum um flottasta bilin. - Slitin dekk, sprekkur í rútunum og so framvegis telja niður í kappingini, sigur Leif Eliasen, stigtakari og samskipari av Trucker Festivalinum.**

FYRISKIPARI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

- Hesa ferð er Trucker Festivalurin í Klaksvík. Hetta kemst mest av, at vit nú hava fingið ein nýggja samstarvsfelaga. Vit høvdu nakrar fundir við Føroya Shell, og felagið vísti seg at verða alsamt meira áhugað í okkum. Hesir fundir endaðu við, at vit gjørdu avtalu um at samstarva, og við at økið rundanum Shell í Klaksvík, varð valt til festivalin, greiðir Leif Eliasen frá.

Sambært Leifi Eliasen er eisini ætlanin at vaksa um tiltakið hesaferð, í mun til undanfarin ár.

– Seinast vóru 68 bilar við, og ætlanin er at hava einar 100 við í ár. Talan er um allar stórar bilar í øllum aldri.

## Stór kapping

Einasta treyt fyri melda bilin til, er at hann er reinur, men í kappingini spælir eisini nógv annað inn.

- Týdningarmesta grundin til, at Trucker Festivalurin er til, er sjálvandi, at bilførarar sleppa at hugna sær saman, men kappingin um at hava snøggastu bilarnar hevur eisini ein stóran leiklut á festivalinum, leggur Leif Eliasen dent á.

Dømingin verður í høvuðsheitum gjørd á sama hátt, sum tá bilar eru til sýn, har slitin dekk og sprekkur í rútunum telja niður. Men annað hevur eisini nakað at siga, tað er til dømis, hvussu bilurin er lakeraður, um hann hevur motivir ella bara er einslittur. Eisini kann telja upp, um bilarnir kunnu okkurt serligt.

## Klassik bilar

Onkuntíð hevur verið nevnt, at tað bara eru spildurnýggir bilar, ið hava møguleika at vinna nakað av steypunum, ið verða latin, men tað er eisini ein klassik bólkur, har bilar frá 1992 og eldri kunnu vera við.

- Vit halda tað sjálvandi eisini vera stuttligt, um bilarnir verða væl hildnir, og her er tað, at klassik bólkurin kemur upp í myndina. Tað eru dømir um bilar, sum í veruleikanum eru yvir tíggju ára gamlir, men síggja út til at vera tvey ára gamlir, sigur Leif Eliasen.

## Fleiri tiltøk

- Av tí at Shell er við í myndini og skipar fyri nógvum av tí praktiska, hava hinir fyrireikararnir størri møguleikar at gera nøkur ting, ið annars ikki høvdu verið gjørlig, sigur Leif Eliasen.

Av hesum tingum verður helst hugsað um bilboksing, gokart og koyrivenjing.

Koyrivenjing er ikki nakað, ið hevur verið við fyrr, men hetta er vanligt aðrastaðni. Talan er ikki um eina kapping, men meira ein táttur at stytta sær stundir við. Koyrivenjing er, sum navnið sigur, at mann venur nakrar av møguleikunum mann hevur við bilinum.

## Sentralur útjaðari

Klaksvík er ikki líka atkomulig sum Runavíkin, har tiltakið vanliga hevur verið, men hetta sær Leif Eliasen ikki sum nakran trupulleika.

- Tað kann gott vera, at Klaksvíkin er hinumegin Leirvíksfjørð, men vit halda hesa loysn vera góða, tí Klaksvík er sum heild ein forvitin býur, og tað er ikki langt til Klaksvíkar. Sjálvandi er eisini ein stór grund til, at Klaksvíkin er staðið vit halda festivalin, at Shell í Klaksvík hevur eitt so stórt øki rundanum. Vit halda tað eisini vera sera stuttligt, at Klaksvíkar sløkkilið kemur at stuttleika sær eitt sindur saman við okkum.